# U-landslið til NM

**Bæði á kvinnu- og manssíðuni fara Føroyar at taka lut, tá kappast verður um NM-heitið í flogbólti fyri U-19 lið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í døgum 4. – 7. september verður kappast um Norðurlandameistaraheitið í flogbólti fyri U-19 lið.

Sum vant, so fara Føroyar eisini at hava umboð í hesi kapping, og hava bæði kvinnur og menn vant við fullari ferð til kappingina.

Upprunaliga vórðu tveir bruttohópir úttiknir, men nú farið verður til kappingina, er hetta skorið niður til tveir hópir á ávíkavist 12 og 10 leikarar.

Kappingin fer fram í svenska býnum, Falchoping, sum eisini verður nevndur háborgin hjá svenskum flogbólti. Tað er nevnliga her, at svenska flogbóltssambandið hevur skipað fyri einum serligum studentarskúla, har bert flogbóltsleikarar eru næmingar.

Bæði kvinnur og menn skulu leika fýra dystir hvør, og eru hesir móti Noreg, Svøríki, Danmark og Finnlandi. Sum skilst, so hava allir leikarar gjørt nógv við venjingina gjøgnum alt summarið, men tað hevur verið ein stórur trupulleiki, at dystarvenjing ikki er fingin.

Teir báðir landsliðshópirnir framganga aðrastaðni á síðuni.



*Føroyska U-19 kvinnulandsliðið*



*Eisini menninir skulu royna seg í Falchoping*

### Dómarar við

Føroyar skulu til kappingina eisini hava egnan dómara, og verða tað teir báðir, Jan Hentse og Tummas Óli Mortensen, sum hava fingið hesa uppgávuna. Jan hevur áður verið uttanlands í slíkum ørindum, og eitt nú var hann eisini dómari á Oyggjaleikunum í summar. Hjá Tummas Óla er talan hinvegin um fyrstu dómaruppgávuna uttanlands.

**U-19 liðið hjá kvinnum**

| Nr. | Navn | Fødd | Hædd | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Sára Strøm | 1987 | 1,69 | TB |
| 2 | Ingun Midjord | 1984 | 1,83 | TB |
| 3 | Herbjørg Jøkladal | 1986 | 1,77 | ÍF |
| 4 | Annika Niclasen | 1986 | 1,75 | SÍ |
| 5 | Hildigarð Jakobsen | 1984 | 1,66 | KÍF |
| 6 | Birita Joensen | 1985 | 1,78 | KÍF |
| 7 | Angilie Johannesen | 1985 | 1,73 | KÍF |
| 8 | Annika á Stongum | 1988 | 1,64 | SÍ |
| 9 | Vivian Mikkelsen | 1984 | 1,76 | SÍ |
| 10 | Durita Ljósstein | 1988 | 1,88 | Mjølnir |
| 11 | Karin Mikkelsen | 1986 | 1,69 | SÍ |
| 12 | Maiken Sigmundsdóttir | 1985 | 1,72 | KÍF |

**Venjarar:** Kristian Mikkelsen og Chris N. Petersen

**U-19 liðið hjá monnum**

| Nr. | Navn | Fødd | Hædd | Felag |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Thorvald Danielsen | 1986 | 190 | Mjølnir |
| 2 | Leif D. á Stongunum | 1986 | 183 | Mjølnir |
| 3 | Jón Syderbø | 1987 | 180 | Mjølnir |
| 4 | Ólavur Jensen | 1984 | 173 | SÍ |
| 5 | Jóhan Petur á Stongum | 1985 | 174 | SÍ |
| 6 | Rúni Dam | 1985 | 176 | Fleyr |
| 7 | Ian Dam | 1985 | 181 | Fleyr |
| 8 | Eirikur Thomassen | 1985 | 178 | Fleyr |
| 9 | Terji D. Olsen | 1985 | 185 | Fleyr |
| 10 | Magnus Remberg | 1987 | 184 | Fleyr |



**Søkt verður eftir stuðlum til Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin**

## Stuðul í Sandavági

Søkt verður eftir einum stuðli til kvinnu í Sandavági, ið hevur ALS - Sclerosu. Talan er um 30 tímar um vikuna, við skiftandi vaktum.

## Stuðul í Tórshavn

Søkt verður eftir stuðli til 19 ára gamla kvinnu í Tórshavn, íð er menningartarnað. Talan er um 20 tímar um vikuna, við skiftandi vaktum. Ynski er um eina unga kvinnu, um 20 - 25 ár.

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktaruppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin ynskir stuðlar, ið m.a.:

• kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intutión

• vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir

• eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum

• eru sterkir - bæði til sálar og likam

• kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Størvini verða sett 15. sept. 2003 ella skjótast aftaná. Nærri fæst at vita hjá serráðgeva, Odu Johansdóttir.

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina.
Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er sett til mánadagin 13.09.03, og umsóknir skulu sendast til:

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin**
Att: Oda Johansdottir
Niels Finsensgøta 28
100 Tórshavn

RESTÚTSØLA
NÚ MEIRA NIÐURSETT
byrjar hósdagin 4. september kl. 9.00
Kallkyn
Vágsbotnur • Tel 31 62 06

**Náttarvaktur á Hotel Hafnia**

Vit sóknast eftir tilkomnum fólki til fast starv sum náttarvakt - at byrja sum skjótast.

Talan er um parttíðararbeiðið
*(uml. 113 tímar pr. mánað).*

**Arbeiðsuppgávur:**

- Vaktarhald av hotellinum
- Kundatænasta
- Telefonavgreiðsla
- Ávist roknskapararbeiðið
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Arbeiðið krevur at tú:**

- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fyrikomandi

Tú ert vælkomin at ringja og fáa nærri at vita, við at ringja tlf. 31 32 33 og tosa við Ásu Johnsdóttir.

**P/F HOTEL HAFNIA**
Áarvegur 4-10
Fo-100 Tórshavn
Tlf. 31 32 33 Fax 31 52 50
E-mail: hafnia@hafnia.fo

**Økkara lega**

Heimamissiónin bjóðar rørslu- og menningartarnaðum o.ø., og avvarandi teirra á legu í Nesvík.

Seinasta freist at tekna seg er 5. sept.
Send seðilin til: *Kirkjuliga Heimamissiónin FO-437 Nesvík*
Eisini kann ringjast til Nesvíkar á tlf. 470000 ella til Karen á tlf. 448335

***Lega 1** er frá 12. - 14. spet.*
***Lega 2** er frá 19. - 21. sept.*

2003

## Arbeiðsmenn

Søkt verður eftir 2 røskum arbeiðsmonnum at leggja rør til kloakk v.m. Teir, ið settir verða koma at arbeiða í stóru útstykkingini Hoyvíkshagi Suður.

Størvini verða sett skjótast gjørligt.

J&K
**Byggisamtakið Hoyvíkshagi Suður**
Við Løgmannabreyt
FO-100 Tórshavn
Tlf. 315060

## 10-mannafar og 19 tonsari til sølu

• Nýbygt 10-mannafar til sølu fyri 45.000 kr.
• 19 tonsari Hamranes uttan fiskiloyvi til sølu.

**Tlf. 44 80 73**

**Søkt verður eftir goymslufólki**

**Við møguleika fyri læruplláss.**

Vit søkja eftir fólki til fyritøku okkara, arbeiðsuppgávurnar koma at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring, bílegging av vørum, umframt aðrar uppgávur.

Er spurningur ella ivamál ringið til okkara á tlf. 315600

Umsókn ynskist til 15. september 2003

*Handilsfyritøkan Kaj Andreasen & Co. varð stovnað í Tórshavn í 1970. Fyritøkan útvegar maskinur og útgerð til byggivinnuna, og útgerð til fiski- alivinnuna, skip og bátar*

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Postboks 1200 · 110 Tórshavn · www.andreasen.fo